# Rósan er eitt tekin um kærleika

Fyrsta konfirmatiónin í meiri enn 200 ár varð hildin í Mikladali páskadag. Teir fýra konfirmantarnir gjørdu allir sítt til at gera gudstænastuna hátíðarliga.



*Teir fýra konfirmantarnir úr Kalsoynni fingu ein minniligan konfirmatiónsdag í Mikladals kirkju. Inni í kirkjuni síggjast f.v. Ólavur Syderbø av Húsum, Jógvan Joensen av Trøllanesi, Joan Fríðudóttir Isaksen av Húsum og Ingibjørg Hansen úr Mikladali*



*Jógvan Joensen lesur inngangsbønina*



*Teir fegnu konfirmantarnir heilsa fólki uttanfyri kirkjuna í góðveðrinum páskadag*

KONFIRMATIÓN

*Snorri Brend*
*Myndir: Jon Hestoy*

**Mikladalur:** Tað er ikki hvønndagskostur at konfirmatión verður hildin í Mikladali.

Og tað er heldur ikki á hvørjum degi, at vaksnamannadópur er í kirkjuni í bygdini.

Alt hetta fór kortini fram ein og sama dag, nevniliga páskadag, tá fyrsta konfirmatiónin í 206 ár varð hildin í kirkjuni.

Henda dagin vórðu fýra ungfólk úr Kalsoynni konfirmerað av sóknarprestinum Hans Eiler Hammer í teirri fullsettu kirkjuni.

Tey fýra, sum vórðu konfirmerað vóru: Jógvan Joensen av Trøllanesi, Ingibjørg Hansen úr Mikladali, Ólavur Syderbø og Joan Fríðudóttir Isaksen av Húsum.

## Sangur og dópur

Hátíðarliga gudstænastan byrjaði sum allar hinar við klokkuringing og síðani præludium, meðan prestur og teir fýra konfirmantarnir gingu inn í prosesjón saman við skótum.

Tey hava gingið til prest, og undir hesi fyrireikingini hava tey eisini lagt upp til sjálvi at luttaka undir gudstænastuni.

Hetta byrjaði longu við inngangsbønini, sum Jógvan Joensen av Trøllanesi las. Tá komið varð fram til epistulin til henda hátíðardagin var tað Joan Fríðudóttir Isaksen, sum las hann upp.

Eftir næsta sálm var so vaksnamannadópur á skránni. Her vórðu tvær ungar kvinnur doyptar – onnur konfirmanturin, Ingibjørg Hansen og systkinabarn hennara, tann 22 ára gamla Gunnvør Joensen.

Tá hesin parturin var liðugur fór Ingibjørg Hansen fram á kórsgáttina, har hon enn einaferð prógvaði ótrúligu sanggávur sínar, tá hon legði bæði sál og rødd í sangin "Jesus, hitt einasta".

Síðani gekk gudstænastan fyri seg við konfirmatiónini, har prestur gav teimum góð orð við á vegnum, eina Bíbliu við einum skriftarorði í, eins og hann handaði teimum eina reyða rósu.

- Henda reyða rósan er eitt tekin uppá Guds kærleika. Hon sigur, at vit øll eru elskað av Jesusi, so sum vit eru. Og hon sigur eisini, at hann vil verða við okkum teir dagar, tá tornarnar stinga og naga, legði Hans Eiler Hammer dent á.

Gudstænastan endaði við at Ólavur Syderbø las útgangsbønina, áðrenn klokkarin ringdi tey 9 sløgini og postludium varð spælt. Undir postludiuminum gingu konfirmantarnir út aftur í prosesjón – út í tað vælsignaða páskaveðrið.